# Fimleikaframsýning í Klaksvík

**Høllin var fullsett, tá Klaksvíkar Fimleikafelag sunnudagin fór undir sína fjórðu fimleikaframsýning, síðan felagið varð endurstovnað.**



*Flott var at síggja úrslitið av fleiri mánaðum við venjingum*
*Mynd: Blitz Foto*

FIMLEIKUR
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík, Sosalurin:** Framsýningin byrjaði klokkan 15.30, men longu áðrenn hetta var høllin fullsett. Tá Klaksvíkar Hornorkestur hevði spælt innmarsjin, varð farið eftir meir stólum, men heldur ikki hetta var nóg mikið. Fólk stóðu í báðum endum av høllini, eins væl og øll sitiplássini vóru upptikin.

### 200 luttakarar

Klaksvíkar Fimleikafelag hevði yvir 200 luttakarar við á framsýningini, sum vardi í góðar tveir tímar. Hesir luttakarar vóru børn heilt úr fyrsta flokki upp til tilkomnar kvinnur.

Framsýningin innihelt mangt og havt. Luttararnir vístu millum annað føroyskan dans, nýmótans dans og eisini lop av ymsum slag.

Allar framsýningarnar gingu skjótt og væl, og sóu fólk úrslitið av fleiri mánaðum við venjingum.

Eisini venjararnir sloppu framat. Í einum av steðgunum komu allir venjararnir inn á gólvið íklødd ymiskt stuttlig klæðir, og tey upptraðkaðu við øllum møguligum. Eitt skemtiligt innslag, sum fekk alla høllina at flenna.

### Dansihugni

Siður er, at eitt gestalið er við á hvørjari framsýning, og so var eisini hesuferð.

Eitt kvøld um vikuna hittast nøkur tilkomin pør í Klaksvík til fólkadans, og kallað hesi fólk seg Dansihugni. Á framsýningini framførdu tey ymisk dansispøl, og var hetta sera hugnaligt at síggja.

### Silvi á vitjan

Framsýningin endaði við, at allir luttakararnir komu út á gólvið saman við Silva, har tey gjørdu eitt sindur av felags fimleiki.

Eftir hetta fingu øll børnini høvi til at heilsa uppá Silva, og hetta dámdu teimum bara heilt væl.



*Gestaliðið hesuferð var Dansihugni, sum framførdi ymisk dansispøl.*
*Mynd: Blitz Foto*



*Kvinnurnar vístu, at føroyskur dansur hóskar seg eisini til fimleik.*
*Mynd: Blitz Foto*




**Konfirmatións-klæðir til hansara**



**fáast í**

**Kallkyn** Vágsbotnur Tel. 31 62 06

## Fornminnisfelagið í Nes kommunu

heldur ársaðalfund í gamla prestagarðinum á Nesi 23. mars 2002 kl. 13.30. Skrá sambært lóg felagsins.

**Nevndin**

Frá

## Havnar Handverkarafelag / Eftirlønargrunninum

Ársaðalfundurin verður mikudagin 27. mars kl. 19[00] á Hotel Hafnia.

Skrá samb. § 25 í lógini:

1. Val av orðstýrara
2. Frágreiðing frá farna árinum
3. Roknskapur til góðkenningar
4. Innkomin mál/lógarbroytingar
5. Val av nevnd
6. Val av tveimum grannskoðarum
7. Ymiskt

Aftaná aðalfundin verður aðalfundur í Eftirlønargrunninum við hesi skrá:

A. Val av orðstýrara
B. Frágreiðing frá nevndini um virki grunnsins í farna árið
C. Framløga og góðkenning av roknskapi og fíggjarstøðu
D. Støða verður tikin til, hvat gerast skal við møguligt avlop ella hall
E. Val av nevndarlimum
F. Val av grannskoðara
G. Møgulig mál frá nevnd/limum
(Uppskot er um, at aðrir enn limir í Havnar Handverkarafelag kunnu gerast limir í Eftirlønargrunninum)

**Havnar Handverkarafelag/Eftirlønargrunnurin**

## Valúrslit fyri UMBOÐSRÁÐIÐ í S/F Tryggingarfelagnum Føroyar

Víst verður til lýsing í bløðunum um miðjan januar um val til umboðsráðið fyri S/F Tryggingarfelagið Føroyar.

Tey 12 valdu umboðini, sett í røð eftir tali av atkvøðum, eru hesi:

| | |
|---|---|
| 1. Hanus Hansen, Undir Brúnni 22, Klaksvík | 305 atkvøður |
| 2. Jógvan Lützen, Stoksoyrarvegur, Klaksvík | 297 -- |
| 3. Jákup Sólstein, Nýggivegur 20, Klaksvík | 274 -- |
| 4. Dan Joensen, Traðagøta 24, Argir | 260 -- |
| 5. Jan Müller, Sleipnisgøta 10, Tórshavn | 152 -- |
| 6. Egon Hansen, Fútalág 14, Tórshavn | 150 -- |
| 7. J. Birgir Mohr, Sandur | 126 -- |
| 8. Mamy Dahl Sørensen, Viðareiði | 116 -- |
| 9. Páll Petersen, Kaldbak | 106 -- |
| 10. Andrias Ziska, Varðabrekka 3, Tórshavn | 99 -- |
| 11. Jákup S. Lauritsen, Sørvágur | 92 -- |
| 12. Schandorff Vang, Oyrarbakki | 84 -- |

**Valskeiðið**
Valið er galdandi í fýra ár, og valskeiðið verður roknað frá endanum av ársaðalfundinum í ár.

Tórshavn 13. mars 2002

**S/F Tryggingarfelagið Føroyar**
**Stjórnin**

SANSIR · TEL 355 355

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
Kongabrúgvin, P.O.Box 329, FO-110 Tórshavn, Faroe Islands
Tel+298 345600, Fax+298 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

**Toll- ogSkattstovaFøroya**
**Stýrið**

### Sjálvuppgávan 2001

Sjálvuppgávan fyri árið 2001 skal vera Økisskrivstovunum hjá Toll- og Skattstovuni í hendi í seinasta lagi fríggjadagin, hin 15. mars 2002.

Roknskaparskyldug hava tó aðrar freistir.

Argir, 12. mars 2002

**Toll- ogSkattstovaFøroya,Stýrið**

**Meginfelag Áhugaleikara Føroya**

## Aðalfundur

verður leygardagin 13. apríl 2002 kl. 10.00 í Áarstovu í Sjónleikarhúsinum í Havn
Dagsskrá sambært lógini

**Nevndin**